Oddagrein

Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo



# HELDUR PARODIIN FRAM?

Í síðstu viku sóu vit ein kontantan og avgjørdan løgmann. Ein løgmann, sum ikki fann seg í, at Fólkaflokkurin enn einaferð slapp sær undan at taka undir við fíggjarkarminum fyri komandi ár. Ein løgmann, sum setti Fólkaflokkinum stólin fyri hurðina: Hann vildi hava at vita, hvar Fólkaflokkurin var, í samgongu ella í andstøðu.

Úrslitið av hesum var, at Fólkaflokkurin heitti á løgmann um at loysa hendan trupulleikan við at skriva út nýval. Flokkurin heldur, at valstríð er komið í politikkin – at valstríð er komið í fíggjarpolitikkin, og tað kann bara enda galið.

At valstríð er í politikki og fíggjarpolitikki, tað er væl saktans einki nýtt í tí. Tað eru hægst góðir 10 mánaðir til løgtingsval í seinasta lagi skal vera – og soleiðis er tað altíð, tá vit nærkast vali.

Vit hava fleiri ferðir skrivað, at samgongan í mangar mátar tykist vera ein parodi. Vit hava funnist at løgmanni, tí at einki fær avleiðingar. Tí var tað so forfrískandi at síggja ein kontantan løgmann í síðstu viku. Men fríggjakvøldið í Degi og Viku sóu vit aftur tann gamla Kaj Leo Johannesen, sum tekur tað púra róligt. Hann hevur hugsað um tingini - hann hevur tosað við tingbólkin hjá Sambandsflokkinum, sum hann er samdur við, og komin til ta niðurstøðu, at hann fer ikki at skriva út val. Hann gongur sostatt ikki ynskinum hjá Fólkaflokkinum á møti.

Løgmaður og tingbólkurin hjá Sambandsflokkinum eru samdir um, at samstarvið við Fólkaflokkin hevur verið gott. Tí vil hann ikki í óðum verkum skriva út nývál, hann vil heldur mýkja støðuna.

Men Fólkaflokkurin stendur fast upp á sítt, og hann vil hava nýval – ella kanska ein nýggjan løgmann. Okkurt spæl er fyri gallarínum. Spurningurin er so bara, um løgmaður hevur tryggjað sær annað samstarv í tinginum, so parlamentariska grundarlagið er tryggjað – ella um hann vil gera Fólkaflokkin til syndabukk við at leggja fram misálit á løgmann.



Men sambært øllum sólarmerkjum, so eru tað løgmaður og Sambandsflokkurin, sum hava vunnið upp á hetta samstarvið, meðan Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin missa. Sambandsflokkurin etur av Javnaðarflokkinum, sum nú hevur fingið nýggjan formann, sum greitt hevur sagt, at Javnaðarflokkurin er ein samríkisflokkur, so hann trolar týðuliga innanfyri hjá Sambandsflokkinum aftur.

Hvussu leikur fer, fáa vit at síggja. Men um einki misálitisuppskot verður reist móti løgmanni á tingfundinum í morgin – ella nýtt samstarv proklamerað, so kunnu vit bara staðfesta, at parodiin heldur fram.

**Man eitt misálit verða reist móti løgmanni í morgin???**

## Bogi á veg í Fólkaflokkin?

Hvørki ja ella nei. Bogi Andreasen vil hvørki vátta ella avsanna leysasøgurnar um, at hann er á veg í Fólkaflokkin.

At hann samstundis hartar sína egna flokk, Tjóðveldi, í Sosialinum fríggjadagin, má tulkast sum um, at okkurt er galið millum Boga Andreasen og Tjóðveldi.

Bogi Andreasen varð fyrstvaldur á tjóðveldislistanum til býráðsvalið í Havn í 2008, og hann er varaborgarstjóri í samgonguni millum Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin.

Og skuldi tað hent, at Bogi Andreassen skiftir flokk og fer í bólk saman við Fólkaflok--kinum í Tórshavnar Býráð, so fær tað ongan týdning fyri samgonuna, tí hon hevur sum er níggju av 11 býráðslimum aftan fyri seg. Men helst høvdu nevndirnar verið valdar av nýggjum, og nýggjar varaborgarstjóri valdur fyri Tjóðveldi. Næstvald á tjóðveldislistanum er Marin Katrina Frýdal við 339 atkvøðum, síðani Jógvan Arge við 337 atkvøðum og Jákup Símun Simonsen við 238 atkvøðum.



## Misálit á løgmann...

Politiska støðan er í skrivandi stund heldur ógreið. Fólkaflokkurin vil hava nýval, men tað vil løgamður ikki. Í síðstu viku vildi løgmaður hava greitt at vita frá Fólkaflokkinum, um hann er í samgonguni ella ikki.

Svarið frá Fólkaflokkinum var heldur ullint, men kann valla skiljast øðrvísi, enn at flokkurin ikki ynskir at vera í samgonguni – tí hann vil hava løgmann at skriva út nýval.

Men tað vil løgmaður ikki. Hann vil heldur mýkja støðuna, og tá má so merkja, at hann ætlar at reka Fólkaflokkin í rætt aftur.

Í fjør var eisini orrusta um fíggjarkarmin. Fólkaflokkurin tók ikki undir við honum, og í kjalarvørrinum restu andstøðuflokkarnir misálitisuppskot á løgmann.

Høgni Hoydal, Jenis av Rana og Kári P. Højgaard søgdu tá, at politiska støðan hevði verið merkt av fullkomnum ruðuleika í longri tíð.

Var ruðuleikin stórur tá, so er hann ikki minni nú – tá ein av samgonguflokkurin biður um nýval.

Tí er hugsandi, at misálit verður reist á løgmann og harvið samgonguna, á tingfundinum í morgin.

Avgerðina eiga Fólkaflokkurin og Tjóðveldi – um ikki løgmaður hevur gjørt undirhondsavtalu um okkurt annað.



**Tilfeingisgjald og landsbankastjórin**

JÓGVAN SUNDSTEIN
KJAK Á SÍÐU 14



**Føroya Banka toskurin**

JOHAN MORTENSEN
KJAK Á SÍÐU 27

## Áttanda samgonguslitið



**Exit Fólkaflokkurin:** Um samgongan hjá Kaj Leo Johannesen, løgmanni, kollsiglir, so verður tað áttandu ferð, at ein samgonga kollsiglir.

Sjeynda ferðin var í 2008, tá Jóannes Eidesgaard koyrdi Tjóðveldi úr samgonguni, og nýggj ABC samgonga varð skipað.

Sætta ferðin var, tá Anfinn Kallsberg koyrdi Tjóðveldisflokkin úr samgonguni í 2003 og skrivaði út nýval.

Fimta ferðin var, tá Javnaðarflokkurin tók seg úr samgonguni hjá Edmund Joensen í 1996, og Fólkaflokkurin fór upp í samgonguna ístaðin.

Fjórða ferðin var, tá Marita Petersen, løgmaður, koyrdi Fólkaflokkin úr samgonguni í 1993 og skipaði nýggja samgongu við Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkinum.

Triðja ferðin var, tá samgongan hjá Jógvan Sundstein millum Fólkaflokkin, Sambandsflokkin og Tjóðveldisflokkin legði kongin í 1989, og val varð útskrivað.

Onnur ferðin var, tá Sjálvstýrisflokkurin tók seg úr samgonguni hjá Jógvan Sundstein í 1989, og Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin skipaðu nýggja samgongu

Fyrsta ferðin var, tá samgongan hjá Atla Dam millum Javnaðarflokkin, Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin slitnaði í 1980.

Ein broyting var í samgonguni hjá Atla Dam í 1988. Kristiligi Fólkaflokkurin fór úr samgonuni. Men flokkurin var farin í tvíningar, og Adolf Hansen, sum var farin úr flokkinum og hevði stovna Framsóknarflokkin, kom upp í samgonguna. Hendan broyting var so lítil, at vit hava ikki valt at kalla tað samgonguslit.

Tað vil siga, at hóast átta ella níggju samgongukreppur og slit, so er tað bara tríggjar ferðir endað við nývali: Í 1980, í 1990 og í 2004.

Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

Marknaðardeild
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

*Haldarar, sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*